# ítróttur

Nr. 120 • týsdagur • 28. juni 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


## Kappróður í morgin



**Í mikudagsblaðnum hava vit drúgva umrøðu av kappróðrinum á jóansøku**

# Bumbur nærkast HB-leguni

**Enn eru eingi nøvn váttað, men tað tykist púrasta vist, at tey í HB arbeiða hart í royndunum at styrkja um hópin áðrenn dystirnar móti Kaunas. Tveir dystir, sum í besta føri kunnu tryggja fíggjarliga fundamentið hjá HB langt fram í tíðina**




*Todi Jónsson er bara eitt av nøvnunum, sum hevur verið sett í samband við HB, men hetta varð fríggjadagin avvíst av Toda sjálvum*

EUROPA-CUP
*Jákup Mørk*

Todi Jónsson og Morten Wieghorst. Tað eru bara tvey av nøvnunum, sum síðani fríggjadagin hava verið sett í samband við HB, nú møguleikin fyri eini uppgerð við Champions League meistararnar úr Liverpool brádliga er á skránni.

### Einki verður váttað

Enn hevur ikki verið gjørligt at fáa nakað sum helst av hesum váttað, men sum tikið verður til, so rýkur tað sjáldan av ongum brandi.

Í útvarpinum fríggjadagin váttaði liðskiparin hjá liðnum, Rúni Nolsøe, at tað longu varð tosað um hetta, og veruleikin er, at tað á ongan hátt tykist ósannlíkt, at talan verður um styrk.

Og verður samanborið við støðuna í fjør, so gerst møguleikin enn meira sannlíkur. Tá arbeiddi HB nevnliga við at fáa eina leiguavtalu um Jákup Mikkelsen til teir báðar dystirnar móti Gerogiska FC Wit. Hetta tí Bárður Johannesen var úti við skaða.

Tær ætlanirnar møttu stóra mótstøðu frá HB viðhaldsfólkum, og hon varð eisini av ongum. Men sum dystirnir báðir háttaðu sær, so ber illa til at staðfesta annað, enn at møguleikarnir hjá HB høvdu verið heilt góðir, um landsliðsmálverjin hevði vart málið.

Og í Heine Fernandez hevur HB hartil ein venjara, sum hevur góð sambond við nøgvar royndar fótbóltskreftir í Danmark. Hann er fyrrverandi liðfelagið við eitt nú Toda Jónsson, og eisini hevur gjøgnum árini komin at kenna hópin av stórum donskum fótbóltsnøvnum. Eitt nú Brøndby-veteranin, Morten Wieghorst, sum júst hevur sett fótbóltsgaggurnar á hillina í Brøndby,

Viðvíkjandi Toda, so sigur klaksvíkingurin tó sjálvur, at hann ikki hevur tosað við umboð fyri HB.

Sjálvur er Heine í løtuni á venjaraskeiði í Danmark, og tí hevur tað ikki eydnast okkum at fáa fatur á honum, men hetta skuldi so eisini gjørt, at tað lá enn betri fyri hjá honum at tosa við spælarar, sum møguliga kunnu klæðast í reyð/svarta búnan.

### Nakað stórt í væntu

Og tí kann eisini roknast við, at talan ikki verður um somu innanhýsis mótstøðu hesaferð. Serliga ikki, tá bæði fíggjar- og ítróttarliga gularótin er somikið stór, sum hon er hesaferð.

Frá álítandi keldum frættist eisini, at HB-stuðlarnir longu eru farnir í holt við at savna pening til nakað »stórt« sum tikið verður til. Hvørki hjá stuðlafelagnum ella hjá nøkrum av nevndarlimunum fæst tó váttan fyri, júst hvat talan er um, tað tykist púrasta vist, at okkurt fer at henda.

Hvussu stórar bumburnar so verða, og hvussu hvøllir brestirnir blíva, er so ein onnur, og væntandi verða fleiri kapittul av hesari skrivaðir komandi dagarnar. Skotbráðið er í øllum førum stutt, tí longu 13. juli er fyrri dysturin móti Kaunas á skránni.

# HB er farið til arbeiðis

**Ein møguligur dystur móti Liverpool er nógvar milliónir verdur, og tí kannar felagið í løtuni møguleikan at styrkja um hópin**

CHAMPIONS LEAGUE
*Jákup Mørk*

Lutakastið til Champions League undankappingina var ikki meira enn liðugt, áðrenn søgurnar um komandi HB-spælarar fingu bein at ganga á.

Við møguleikanum fyri einum dysti móti Liverpool í næstu umfarinum, er talan í øllum førum eina fíggjarliga gularót av teimum heilt stóru. Og hetta ásannaði stjórin í P/F Havnar Fótbóltur, Steinfinnur Mittelstein, eisini, tá vit sunnukvøldið fingu orðið á hann.

- Nú eri eg akkurát lendir, so vit hava ikki fingið tosað nakað serliga nógv um hetta. Men eg skilji, at søgurnar eru nógvar.

*Men er ikki hald í søgunum skilt á tann hátt, at tit veruliga arbeiða við at styrkja um liðið?*

- Tað er sjálvandi nakað, sum vit fara at viðgera. Enn fái eg bara ikki sagt, hvat tað blívir til, ella um tað yvir høvur verður til nakað, staðfestir Steinfinnur.

### Nógvar milliónir

Um fíggjarliga partin í einum møguligum dysti móti Liverpool, dylir Steinfinnur ikki fyri, at talan kann gerast um heilt munandi upphæddir, um felagið kemur somikið langt.

Tøl sum fimm og tíggju milliónir hava verið nevnd, og hóast Steinfinnur ikki kann vátta hesi, so verður tað heldur ikki avsannað.

- Eg royndi alt fyri eitt at spyrja umboðið fyri SportsFive, hvat ein slíkur dystur kann verða verdir, men eg fekk einki greitt svar. Men talið liggur helst onkra staðni har ímillum, sigur hann.

Og verður rætt borið at, so kann talan helst gerast um heilt stórar upphæddir. Í mun støðuna, sum onkra tíð hevur verið, so hevur HB ikki longur nakrar fasta avtalu um sjónvarpsrættindi. Tað merkir, at hvør dysturin verður seldur fyri seg, og so kann ein dystur móti Liverpool væl kostað heilt nógv. Hartil skulu leggjast lýsingarinntøkur og áskoðaðarapeningur, so samanlagt kann talan gerast um eina heilt trivaliga upphædd.

Men fyrst, so skulu teir báðir dystirnir móti Kaunas sjálvandi spælast, og bara tað í sjálvum sær kann væl gerast ein stór uppgáva!




*Steinfinnur Mittelstein váttar, at møguligur styrkur er nakað, sum arbeitt verður við, men enn vil hann ikki seta nøvn á nakað sum helst*